# Gott fyri profilin hjá Teiti

**Hóast sigurin í DMA er sera spennandi og hækkar munandi um profilin hjá Teiti, so loyvir fulla skráin og stóri áhugin fyri Teiti í eitt nú USA, ikki, at fleiri konsertir koma á skránna í Danmark fyribils.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Teitur er í dag á veg úr Los Angeles til New York. Tí var ikki møguligt at fáa viðmerking frá honum. Ístaðin prátaðu vit við mannin, sum í størri mun enn nakar annar hevur virkað fyri at gera heimin varðan við tónleikin hjá Teiti, umboðsmann hansara Christin Ulf-Hansen.

Christian greiddi frá, at bæði hann og Teitur vóru sera fegnir um heiðurslønina.

### Fyrst og fremst føroyingur

Hóast Teitur var glaður fyri at vinna eina DMA heiðursløn, so helt hann røðuna á føroyskum, hetta var fyrst og fremst fyri at gera vart við sína støðu sum føroyingur.

- Teitur er errin av at vera føroyingur, og hann føldi, at tá hann var í uppskoti til hesa heiðursløn var tað týdningarmikið at gera vart við, at hann var úr Føroyum.

### Hækkar munandi um profilin

- Vit vóru glaðir, tá vit hoyrdu at hann var í uppskoti, og tá vit hoyrdu, at hann hevði vunnið vóru vit enn fegnari. Hetta hækkar munandi um hansara profil í Danmark. Eg havi longu tosað við útbreiðslufelagið hjá okkum har, Playground Music, um hvussu hetta kann brúkast í marknaðarføringini. Hetta merkir ikki, at vit fara at kroysta navnið Teitur niður í hálsin á dønum, men heldur at vit spakuliga leggja meira dent á marknaðarføring á danska marknaðinum upp til konsertferðina hjá honum í Danmark í apríl, greiðir Christian Ulf-Hansen frá.

- Hetta er heilt víst eitt gott ting fyri Teitur, og hjálpir okkum við at halda lív í søluni av fløguni. Fløgan er djúp og vísir nógvar síðir av Teiti, so vit vóna at halda lív í áhuganum fyri henni alt summarið, sigur Christian.

### Tvær stakfløgur á veg

Higartil er bert tann eina stakfløgan Louis Louis komin út, men ætlanin er at geva Boys She Can Sing og Hitchiker út sum stakfløgur, enn er tó ikki greitt hvør av hesum verður givin út fyrst.

- Vit hava gjørt eitt ótrúliga gott sjónbandalag av Hitchiker, so tað er spennandi, sigur Christian.

### CNN og Hard Rock Café

Hann greiðir frá, at hóast fokus nú er sett á Teit í Danmark, so ber fyribils ikki til, at leggja nakrar aðrar konsertir til rættis í Danmark, enn tær 10, ið longu eru skrálagdar í apríl. Hetta kemst fyrst og fremst av, at skráin hjá Teiti er somikið full við konsertum í USA, Onglandi, Avstralia og Íslandi. Í løtuni er Teitur í USA, har hann í morgin skal gera samrøðu við CNN í New York um tónleik sín.

- Tá Teitur gav fyrru fløguna út, gjørdi CNN eina feature um Teit. Hesin var sendur á stóru heimsumfatandi sjónvarpsrásini, umframt at hann lá á heimasíðuni hjá CNN, ið er tann 12. størsta heimasíðan í USA. Tað er tann sama sjónvarpskvinnan, ið gjørdi ta sendingina, ið ger samrøðuna í morgin. Hetta er sjálvandi sera spennandi fyri okkum. Men har er eisini nógv annað á skránni, í gjár var Teitur t.d. á eini stórari útvarpsrás. Í ovurmorgin fer Teitur undir í samstarv við Hard Rock Café, har hann spælir nakrar konsertir fyri vælgerandi endamál. Hetta kemst av, at fólkini, ið eiga Hard Rock Café ketuna, dáma væl Teit. Tey hava tí heitt á hann, um at spæla 3 konsertir til frama fyri okkurt vælgerandi, so tað er eisini eitt samstarv, ið kann gerast sera spennandi, greiðir Christian frá.

# Hvalbingar vónbrotnir um nýggjan tunnil

**Skulu politikarar ganga eftir, hvat loysir seg best, er ongin ivi um, at ein nýggjur Hvalbiartunnil eigur at standa fremst á listanum, heldur bygdaráðið í Hvalba**



*Hvalbiartunnilin lýkur ikki tey mest grundleggjandi krøvini, hvørki til ferðslu ella til trygd og hvalbingar góðtaka ikki at ein nýggjur Hvalbiartunnil verður útsettur meiri*

HVALBIARTUNNIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er onki dulsmál, at hvalbingar eru altráðir eftir at fáa nýggjan tunnil.

Hvalbiartunnilin er fyrsti tunnil í landinum, men nú er tíðin langt síðani farin frá honum og tí hava Hvalbingar strongt á fyri at fáa Løgtingið at fara undir nýggjan tunnil, sum lýkur nútíðarkrøv.

Hetta er eitt mál, sum fyllir nógv í dagliga prátinum í bygdini og hetta er eisini eitt mál, sum bygdaráðið javnan hevur til umrøðu.

Tað hevði bygdaráðið eisini á seinasta fundi, sum var í farnu viku.

Har varð enn einaferð heitt á politikarar um at taka hetta mál í størri álvara, enn higartil.

Hvalbingar hava fyrr vent sær beinleiðis til allar politikarar úr Suðuroy og víst teimum á, hvussu neyðugt tað er við nýggjum tunli og heitt á teir um at virka fyri einum nýggjum tunli.

Men í bygdaráðnum eru tvey bæði vónbrotin og misnøgd um, at tað er bara ein politikari, sum hevur ønt teimum aftur og tað er Hendrik Old.

Tvørturímóti var tað næsta, hvalbingar sóu, at í visjón 2015 hjá landsstýrinum, er ein nýggjur Hvalbiartunnil raðfestur aftast av øllum, tí eftir henni, skal tunnil ikki koma fyrrenn akkurát í 2015.

Hetta nokta hvalbingar at trúgva og teir vilja ikki góðtaka at bíða so leingi.

Tí krøkja teir seg í boðini frá Hendriki Old, sum hevur varhugan av, at samgongan raðfestur ein nýggjan Hvalbiartunnil rættiliga frammaliga.

Men enn er ongin politisk avgerð tikin um tunnilin og fyrrenn tann avgerðin er tikin, ætla hvalbingar ikki at seta seg upp aftur á at bíða.

So tá ið Hvalbiar Bygdaráð tosaði um tunnilin á fundi í farnu viku, varð avgjørt at bygdaráðslimir skuldu gera, tað teir kunnu, fyri at sannføra politikarar um, at tað er neyðugt at gera nýggjan Hvalbiartunnil beinanvegin, skal vinnulívinum í bygdini vera lív lagað.

Teir sipaðu til, at nú á døgum halda politikarar, at tað er ógvuliga umráðandi at gera kostnyttu kanningar av teimum útbyggingum, sum skulu gerast.

Men í bygdaráðnum í Hvalba eru tey púra sannførd um, at ein kostnyttu kanning hevði staðfest, at av øllum tunlum omansjóvar, er ein nýggjur Hvalbiartunnil tann tunnilin, sum loysir seg best at fara undir beinanvegin, tí tað er so nógv vinnulív í Hvalba.

Tí vóna tey í bygdaráðnum í Hvalba, at ein kostnyttu kanning verður gjørd - og at hon verður fylgd.

### Lýkur ongi krøv

At Hvalbiartunnilin er ov trongur, førir við sær, at nútíðar lastbilar fáa ikki brúkt hann. Og tað darvar fjølbroytta vinnulívinum í bygdini almikið, tí nógv vøra skal lastast um, bæði tá hon hon kemur til bygdar og tá ið hon skal av bygdini.

Tað kostar bæði tíð og pening. Soleiðis hevur flakavirkið í Hvalba roknað út, at hendan eyka umskipingin av fiski, kostar teimum fleiri hundrað túsund krónur um árið í eyka útreiðslum.

Samstundis hevur teir á trolvirkinum í Hvalba eisini greitt frá í Sosialinum, at kemur ikki ein betri tunnil, kann tað koma í vegin fyri teirra útbyggingarætlanum.

Samstundis vísa kanningar, sum bygdaráðið hevur havt serkøn at gera, at hvalbiartunnilin lýkur ikki mest grundleggjandi trygdarkrøvini. Eitt nú kemur fyri, at tað er so nógv gass í honum, at tað er beinleiðis heilsuskaðiligt.

# Føroyar upp upp í Evropa

**Bjarni Djurholm hevur nú lagt uppskot fyri Løgtingið, sum skulu gera Føroyar til ein part í evropiska tryggingarøkinum.**

Talan er um eitt hitt mest víttfevnandi uppskotið ið er lagt fyri Løgtingið, tí tað er í heili 224 lógargreinum.

Uppskotið vísir, at eitt tryggingarvirksemi er virksemi út um landamørk, ið byggir á altjóða avtalur, harundir ES fyriskipanir. Tískil er fleiri staðni í lógini og viðmerkingunum víst til ES fyriskipanir.

Í ES verður fíggjarøkið skipað í einari løggávu, ið fevnir um bæði peningastovnsvirksemi, virðisbrævameklarar, íløgufeløg, realkreditfeløg v.m, umframt tryggingarfeløg og eftirlønargrunnar. Øll hesi verða undir einum nevnd fíggjarfeløg.

Men lógin, sum nú er løgd fyri Tingið, fevnir bara um fíggjarfeløg, ið eru tryggingarfeløg og eftirlønargrunnar.

Hinvegin leggur lógin upp fyri, at íslendsk tryggingarfeløg kunnu koma inn á føroyska marknaðin, sum endamálið er við Hoyvíkssáttmálanum.

Uppskotið letur upp fyri virksemi at føroysk tryggingarfeløg kunnu virka uttanlands og útlendsk tryggingarfeløg kunnu virka í Føroyum og hetta fer helst føra meiri kapping við sær og sostatt eisini betri og bíligari tænastur,væntar Bjarni Djurholm.

*-áki-*

# Vil verja børn og ung

**Jógvan á Lakjuni hevur lagt uppskpt fyri Løgtingið um at seta eitt ráð, sum skal ráðgeva um filmar, telduspøl**

Tíðin er farin frá gamla filmseftirlitinum. Serliga er útboðið av filmum á fløgu, bondum og ígjøgnum luftina vorðið ómetaliga stórt og fjøltáttað, men tá ið Filmseftirlitið varð stovnað, vóru tað bara biograffilmar at taka støðu til.

Gongdin hesi seinnu árini er eisini farin frá almennum banni og skerjingum. Nú er rákið tann vegin, at brúkarin skal leiðbeinast til eitt skynsamt val av filmum og sostatt verður størri ábyrgd løgd á brúkaran sjálvan.

Tí ætlar Jógvan á Lakjuni, landsstýrismað í mentamálum nú at seta eitt ráð á stovn, sum skal ráðgeva fólki, serliga foreldrum um filmar, telduspøl o.s.fr.

*-áki-*